# Pedagogur til barnagarðin í Nes kommunu

Til barnagarðin søkja vit eftir:
**pedagogi at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 8. august 2005 til 31. mai 2006.**
Á stovuni er 23 børn í aldrinum 3-7 ár.
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Byrjanarstig 10.

Um so er, at ongin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.

**Vit vænta at umsøkjarin:**
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevnir og kann taka ábyrgd
- Dugir at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Ingrid Hansen leiðara tlf. 448760.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Nes Kommunu í hendi í seinasta lagi 10. juni 2005 kl. 12.00.

**Nes kommuna**

# Pedagogur

Barnagarðurin Sýslan søkir eftir einum pedagogi, fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi, at arbeiða 27 tímar um vikuna frá 20. juni 2005 til 30. november 2005 lønarstig 10/16.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur normeraður til 36 børn við 3 stovum, 12 børnum og 2 vaksnum á hvørjari stovu.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðarin ella varðaleiðarin tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera okkum í hendi seinast 5. juni 2005.

**Barnagarðurin Sýslan**
FO-380 Sørvágur


## GSM telefonir &

GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar

**Storno** SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo


# Frá Runavíkar Skúlastýri

**Søkt verður eftir lærarum í hesi størv, sum eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2005/2006.**

Øll størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

1 starv við 27 lønartímum – avlopstímar. Í tímatalvuni eru m.a. tímar við fjølbrekaðum næmingum og gentuítróttur.

1 starv við 27 lønartímum – fyri lærara í farloyvi. Í tímatalvuni eru m.a. tímar í tilevning og enskum

1 starv 24 lønartímar – avlopstímar. Starvið er treytað av øktari játtan vegna øktum næmingatali pr. 1. sept.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 3. juni 2005.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Ásmund Lamhauge, skúlastjóra, tlf. 217331.

**F. Runavíkar Skúlastýri**
v/ Malan Rasmussen, tlf. 441842
Niðari Vegur
FO-660 Søldarfjørður


## Á FLOG UTTANLANDS

**LÆTTARI KANN TAÐ IKKI GERAST**



**FÁ BILIN UMVÆLDAN MEÐAN TÚ ER ÚTI OG FERÐAST**

Vit umvæla bilin meðan tú er uttanlands.
Eftir ynski, heinta vit bilin á flogvøllinum, og hava hann kláran tá tú kemur heimaftur.

Ring í rímuligari tíð á tel 33 28 52 ella 28 38 32, og vit avtala nærri.

**MYLLAN**
Bilverkstaður · 370 Miðvágur



## Arbeiðshandskar

*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820


**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

# Telefonpassari

Søkt verður eftir frítíðaravloysara fyri telefonpassara frá 27. juni til 6. august 2005.

Starvið fevnir í høvuðsheitinum um telefonpassan, sjúklingaleiðbeining og postavgreiðslu.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi arbeiðstíð v.m. fáast við at venda sær til Bergur Stórhamar, fulltrúa lokal 140.

Skrivlig umsókn við upplýsing um starvsroyndir verður at senda til:

**Suðuroyar Sjúkrahús**
umsjónarmaðurin
Postsmoga 51
800 Tvøroyri

Umsóknarfreistin er 6. juni 2005.

# Frá Fuglafjarðar býráð

Feløg og einstaklingar, sum hava ætlanir um at nýta fimleikarhøll skúlans vetrarhálvuna 2005/2006 verða biðin um at senda mentamálanevndini skrivliga umsókn í seinasta lagi **hósdagin 2. juni 2005 kl. 15.00.**

Fuglafjørður 19. mai 2005
**Fuglafjarðar býráð**
Mentamálanevndin

## HJÁ GUNLEIVI

Til handilin við Landavegin verður søkt eftir fyrikomandi og røskum

**krambafólki**

til skiftandi vaktir, uml. 30 tímar/viku.

Ring ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Ann-Britt.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
Tlf. 59 51 60 ella 31 21 61

# Frá Tórshavnar Bátafelag

Aðalfundur felagsins verður mánadagin 6. juni kl. 20.00 í J. H. Schrøtersgøtu 9 í hølum Starvsmannafelagsins.

Skrá sambært lógini. Mál, ið ynskjast viðgjørd, skulu verða nevndini í hendi 8 dagar frammanundan.

**Nevndin**